# 25 milliónir ríkari



Ein 52 ára gamal maður úr Kolding vann leygardagin ein ordans vinning í danska Lotto-spælinum, sum føroyingar eisini dúgliga spæla við í.

Maðurin hevur í nógv ár spælt trúfastur við somu 16 tølum í eini skipan, og tá ið tølini nú góvu bónus, var tað ikki við lít. Maðurin vann heili 25.083.463 krónur. Hetta er størsti vinningur nakrantíð í leygardagsspælinum í Lotto.

Tann 52 ára gamli hevur keypt Lotto-seðilin í sama handli á Sommerfuglevej í Kolding øll árini, og sunnukvøldið feiðraði hann óføra vinningin á matstovu í býnum.

- Vit drukku tíbetur so nógv vín, at tað var eingin trupulleiki at sovna leygarkvøldið, sigur maðurin, sum er ónevndur, við tíðindastovuna Ritzau.

Hann og konan ætla sær at halda fram at arbeiða, men tey umhugsa at fara í niðursetta tíð, nú milliónirnar knappliga rulla inn á bankabókina.

- Eg ætli mær at keypa mær ein lastbil, og so fari eg at koyra fyri meg sjálvan. Annars heldur alt fram sum vanligt. Eg haldi høvdið høgt og beinini á jørðini, sigur maðurin.



















